# TILTØK

**Gudstænastur**
**Septuagesima sunnudagur**
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10, *Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Argir:* kl. 11, Heri Joensen
*Leirvík:* kl. 12, altarg., Uni Næs
*Vágur:* kl. 11 dópur,
*Leiti:* kl. 13, altarg., Patrick de Neergaard
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Hvítanes:* kl. 11, Jóannis Fonsdal
*Hvannasund:* kl. 12, altarg., Elsa Funding
*Skála:* kl. 11,
*Sjóvar kirkja*: kl. 12.10, Jógvan Fríðriksson
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen
*Sørvágur:* kl. 12, altarg., David Johannesen
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð, altarg., (Talvan gongur fyri hjálpararbeiði í Fjareystri)
*Hvalba:* kl. 18, Ólavur Rasmussen
*Tvøroyri:* kl. 11, altarg., Jónsvein Bech
*Hvalvík:* kl. 12, altarg., Mogens T. Christensen
*Kvívík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Sandavágur:* altarg., Inga Poulsen Dam

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánadag kl. 17 og 19 Skótamøtir.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting, barnaansing verður eisini.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Elsa í Skorini um evnið »Góðir vanar í familjuni«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Róland í Skorini um »Er Gud?«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Drekkamunnur verður millum møtini. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Týskvøldið kl. 20 Møti. www.livdin.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Johan Henriksen.

**Fríkirkjan Oasan, Uppi á Brekku 3**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ víkafólki.
Mánakvøldið kl. 20 Kirkjufundur.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Torsten Jortzick prestur, í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli. www.katolsk.fo

**Meinigheitshúsið**
Missiónsvika verður í døgunum 23.-30. jan.:
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, Barnakórið á Argjum syngur. Kl. 18 Møti v/ Snorra Brend, Thaborkórið av Toftum syngur.
Mánadagin kl. 20 Møti v/ Regin Høgnesen, Kristiliga Sangkórið syngur.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini Møti, har Virgar Hvidbro talar.
Kl. 18 verður Evangel. møti, har Páll Poulsen talar.
www.hebron.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mándagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Pól á Kletti.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Jóni Johannesen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC.
Evnið: »At liva í kærleika«. 2. partur v/ Liljan Jacobsen, kl. 18 Møti v/ Ólavur Guttesen.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Frá Ebenezer**
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman við bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin. www.ebenezer.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti v/ Jóhannes Danielsen.

**Saron, Vestmanna**
Leygarmorgunin verður Bíbliuseminar við David Bech. Byrjað verður við morgundrekka kl. 9.00. Sunnudagin Evangel. møti kl. 18. Náttúrði verður aftaná. Verið hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið, Sandavágur**
Missiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 20 Møti har Pól Johannesen talar og Ungdómskórið úr Vágum syngur. Kl. 22 verður Sang- og vitniløta við ungum úr Libanon í Sørvági.
Í morgin kl. 15 Familjusunnudagsskúli við Annelisu Rasmussen og Barnakórinum. Møti verður kl. 18 har Vagn Foldbo talar og Manskórið úr Vágum syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna missiónsviku í Sandavági.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 20 Stuðulskonsert fyri neyðstødd á SriLanka. Luttakandi bólkar verða: Jens og Kristen Lisberg, Magni Christiansen, Ecclesia og bólkur úr Lívdini.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Martin Olsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Hvalvíkar missiónshús**
Missiónsvikan heldur áfram í kvøld kl. 20 Møti við Sólbjørg Símunarson, Argir, Teir úr Kollafirði syngja. Innsavnan til húsið.
Sunnudagin kl. 15 Familjumøti við Marjon Poulsen, barnaráðg., kl. 18 Møti við Niels Jacob Nielsen, trúb. Torbjørn og Steintór syngja. Vit bjóða øllum at vera hjartaliga vælkomin til møtini við Filippibrævið 4,4.

**Avhaldshúsið í Haldórsvík**
Leygardagin kl. 19 Evangel. møti í Avhaldshúsinum. Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við luttøku av Jórun og Kalla, sum greiða frá ferð í Serbia. Verið hjartaliga vælkomin.

**Nerija á Skála**
Møtirøð verður hetta vikuskiftið. Talarar John í Skemmuni og aðrir. Møtini verða fríggjakvøldið og leygarkvødið kl. 20 og sunnudagin kl. 17. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Lívsins Orð Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti. Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum leygarkvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 við sangi og vitniløtu. Opið hús verður til umleið kl. 24. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman týskvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar. Innsavnan til sjómansmissiónina. Árliga festin verður lýst seinni.

**Blákrossfelagið Lamba, Skipanes, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 18 verður Blákrossveitsla í Bønhúsinum í Søldarfirði. Talari verður Sverri Steinhólm, kórið í Søldarfirði kemur at syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og barnakórið venur kl. 15.15. Einki møti verður sunnukvøldið, men ístaðin verður skipað fyri felags koyring til møti á missiónsvikuni í Leirvík. Koyrt verður við bilum frá Thabor kl. 18.40.

**Missiónsvika í Leirvík**
Leygardag kl. 10 Bíbliutími við Frants Jensen, kl. 20 Møti við Bergur D. Joensen, ungdómskórið av Glyvrum syngur.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta við altarg., v/ Una Næs, presti, kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Regin Høgnesen, Húsakórið syngur. Innsavnan til húsið. Drekka verður hvørt kvøld eftir møtini. Øll eru vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti v/ Reimund Langaard, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Preben Hansen.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 26. februar kl. 10.00 giftast í Rituvíkar kirkju Hanna Olsen, Rituvík og Ásmundur Hansen, Søldarfjørður. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 16.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, verða biðin um at ringja á tlf. 442036, 254250, 504970 ella 441396, 447774. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 5. mars 2005 kl. 16.00 giftast í Hvalbiar kirkju, Bettina Cjouanita Tummasardóttir Hentze úr Skopun og Dávur Holm úr Hvalba. Veitslan verður hildin í Roynhøllini í Hvalba,frá kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið á teirra stóra degi, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 260440, ella aftaná kl. 18.30 á tlf. 375036 áðrenn 10. februar 2005.

Leygardagin 5. mars kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Frida Mellemgaard og Jens Kristian Hansen, Tórshavn. Veitslan verður í B36 húsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið, verða biðin um at siga frá á tlf. 322324, 522324 ella 315609 áðrenn 18. februar.

## GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 29. januar kunnu hjúnini Amanda og Leivur Andreasen í Klaksvík halda gullbrúdleyp. Vælkomst verður í Bøgøtu 3 frá kl. 17.00.

## SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 9. februar hava Karl og Anna Sofía Vidtfeldt, Sandur, verið gift í 25 ár. Veitslan verður hildin í Ungmannafelagshúsinum Samljóð í Skopun 19. februar kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at siga frá á tlf. 211584, 361584 ella 224946 áðrenn 3. februar 2005.

1. mars hava Emma og Daniel Johan Lisberg, Sumba, silvurbrúdleyp. Í tí sambandi verður vælkomst í Samkomuhúsinum í Sumba 26. februar frá kl. 12.00-18.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 10. februar á tlf. 370782.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Tænið hvør øðrum í kærleika*
***Gal. 5,13***

Danski rithøvundurin og presturin, Johannes Møllehave, sum eitt skifti var fangahúsprestur, sigur nakað soleiðis frá einum fanga. »Eg kendi ein mann, sum hevði sitið í fangahúsi í 30 ár. Av teimum, sum eg havi kent, er hann tann maðurin, ið hevur verið eina ringast viðfarin. Sum 5 ára gamal sendur á eitt barnaheim. Sligin, bundin, innilæstur, misrøktur og háðaður. Hann varð seinni illa viðfarin av nasistunum undir krígnum; men hann segði, at tað var fyri einki at rokna afturímóti tí viðferð, sum hann fekk á barnaheiminum. »Tey flestu av okkum hava tíbetur minnir um eymleika og kærleika og góður løtur í barnaárunum«.

Einki av hesum átti hann. Tá ið hann var leyslatin, sat hann ein dagin og át saman við okkum og eg spurdi hann tá: »Um tú nú visti, hvat ið tú komst at verða føddur til, at alt kom at verða tað sama, sum tú nú hevur upplivað, sami barndómur, sami uppvøkstur – tey 30 árini í fangahúsi. Um tú nú visti alt hetta frammanundan, og eg spurdi teg, um tú vildi verið føddur til alt hetta ella ikki, hvat hevði tú so svarað«? Svarið fekk okkum at hvøkka við og at undrast. Hann segði: »Eg vildi takka fyri, at eg varð føddur. Tað var ikki uttan lívsvirði og meining. Tað hendi, at tað vóru fangar, sum vóru fyri ongum og fullu í ómegd í fangahúsinum, tí at teir ikki orkaðu at bera revsingina. Og so var tað ofta eg, sum talaði við teir og var um teir. Eg visti jú betur enn mangir aðrir, hvat ið tað vildi siga at sita innistongdur. Og mangar ferðir varð eg teimum til hjálp og troyst. Tað gav lívi mínum innihald. Lív mítt hevði hóast alt eitt endamál. Eg havi hóast alt ikki livað til einkis«.

Fyrrverandi fangin fann lívsinnihaldið í hesum, at hann kundi hjálpa øðrum, grundað á egnar dýrt keyptar lívsroyndir«.

Sjálvandi ynskir eingin at koma illa fyri, men føll og ósigrar eru tó ikki altíð bara til skaða. Vit kunnu eisini gjøgnum føll og ósigrar okkara læra at skilja onnur betur í teirra støðu, læra betur at hava samkenslu við teimum, vísa teimum hjálpsemi og fyrigeving, enn vit kanska dugdu frammanundan. Áðrenn fallið, ella áðrenn okkurt minni gott hendi okkara næstu, vóru vit kanska meira dømandi, sjálvrættvís og miskunnarleys í dómi okkara. Bara at hugsa um seg sjálvan og egna vælveru, skapar tá ið av tornar, ikki annað enn eitt hart sinni, tómleika, misnøgd, kanska einsemi og at enda lívsmøði; men har brúk er fyri mær, og eg havi brúk fyri øðrum, har er lívið.

Kortini verða vit vist so mangan fanga í eginkærleikanum og óviljanum til at tæna. Tí má eisini verða sagt, at kristindómurin stendur og fellur ikki við okkara trúfesti ella tvørrandi trúfesti í tænastuni. Vit eru kalla til at tæna og hjálpa hvør øðrum, har vit eru sett, men vit eru ongantíð latin einsamøll. Jesus er hjá okkum, eisini í føllum okkara. Hann er tí bæði fyrimynd okkara og frelsari okkara.

**Emil Olsen, prestur**